


*Sum lutakastið til hálvfinalurnar í steypakappingini háttaði seg, er møguleikin stórur fyri, at tað aftur í ár verða EB/Streymur og ÍF, sum spæla finaluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Liggur til EB/ Streym og ÍF

**FÓTBÓLTUR** Sum lutakastið í kappingini um Løgmanssteypið lagaði seg mánakvøldið, eru sera góðir møguleikar fyri, at finalan í ár verður millum somu lið sum í fjør

Hilmar Jan Hansen

Tey fýra liðini, sum vóru í bollanum mánakvøldið, tá lutakastið var í 3-2 hjá Kringvarpinum, blivu parað soleiðis, at ÍF skal spæla ímóti 07 Vestur og EB/Streymur skal spæla ímóti B68. Í fyrru hálvfinalunum, sum verða spældar hósdagin 19. mai, hava ÍF og EB/Streymur heimavøll, og í seinnu hálvfinalunum týsdagin 14. juni, eru 07 Vestur og B68 á heimavølli.

Sum sæst, er góður møguleiki fyri, at steypafinalan í ár, sum verður í Klaksvík fríggjadagin 5. august, samstundis sum Summarfestivalurin er har, verður ein endurtøka av henni í fjør, tá EB/Streymur og ÍF møttust og sundalagsmenn vunnu við einum máli.

Í øllum førum má EB/Streymur sigast at vera stórfavorittur ímóti B68, eins og ÍF eisini má vera favorittur ímóti 07 Vestur, sæð yvir tveir dystir. Sjálvandi kann okkurt óvæntað henda, men tað er júst tað, tað verður, eru tað ikki EB/Streymur og ÍF, sum fara allan vegin í finaluna.

Annars er merkisvert, at øll fýra hálvfinaluliðini í landskappingini júst nú teljast millum tey niðastu á stigatalvuni í landskappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Dystir í vikuni:

**VODAFONEDEILDIN**

| | | |
|---|---|---|
| 11/05 | 18.00 | HB - Víkingur |
| 11/05 | 18.30 | B68 - B36 |
| 11/05 | 19.00 | 07 Vestur - B71 |
| 11/05 | 19.00 | EB/Streymur - KÍ |
| 12/05 | 18.00 | NSÍ - ÍF |

**STEYPAKAPPING, KVINNUR**

| | | |
|---|---|---|
| 11/05 | 19.45 | FC Suðuroy - AB |
| 11/05 | 20.15 | HB - Víkingur |
| 11/05 | 20.15 | B36 - KÍ |
| 11/05 | 20.30 | B68/NSÍ - Skála |

### Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 6 | 4 | 2 | 0 | 12 | 3 | +9 | 14 |
| 2 | NSÍ | 6 | 4 | 1 | 1 | 18 | 7 | +11 | 13 |
| 3 | Víkingur | 6 | 3 | 2 | 1 | 14 | 7 | +7 | 11 |
| 4 | KÍ | 6 | 3 | 1 | 2 | 14 | 8 | +6 | 10 |
| 5 | HB | 6 | 3 | 1 | 2 | 11 | 7 | +4 | 10 |
| 6 | EB/Streymur | 6 | 3 | 1 | 2 | 11 | 7 | +4 | 10 |
| 7 | ÍF | 6 | 2 | 1 | 3 | 9 | 11 | -2 | 7 |
| 8 | B68 | 6 | 1 | 1 | 4 | 10 | 10 | 0 | 4 |
| 9 | B71 | 6 | 1 | 0 | 5 | 3 | 24 | -21 | 3 |
| 10 | 07 Vestur | 6 | 0 | 2 | 4 | 4 | 22 | -18 | 2 |

# B36 skal verja oddasessin

**VODAFONEDEILDIN** Enn eina ferð skal oddaliðið á útivølli verja oddasessin, hesa ferð á Toftum. Eisini er áhugaverd toppuppgerðin millum HB og Víking

Hilmar Jan Hansen

Fult miðvikuumfar í Vodafonedeildini er á skránni, tí í kvøld verða spældir fýra dystir og í annaðkvøld ein. Sum heild er talan um áhugaverdar dystir, ið kunnu hava týdning fyri bæði botn og topp.

B36, sum hevur fingið eina framúr byrjan hetta kappingarárið og er einasta liðið, ið enn ikki hevur tapt, skal á Toftir at spæla ímóti B68, sum hinvegin hevur havt eina serstakliga vánaliga byrjan og enn bara hevur skavað fýra stig saman. Sjáldan er talan um málríkar dystir millum hesi bæði liðini á Toftum, og ofta er tað endað við javnleiki, so kanska tað eisini er eitt gott boð hesa ferð.

Í Gundadali møtast tvey av liðunum, ið mugu teljast millum teirra, ið ætla sær langt, tí HB plagar altíð at vera við í endaspurtinum um FM, og Víkingur hevur spælt út við, at meistaraheitið er málið. Avrikini hjá báðum hava verið ivasom higartil, men bæði HB og Víkingur vunnu síðst, so kanska tey fara at leggja nógv fyri í kvøld, so talan verður um góðan og spennandi toppdyst.

Ein annar dystur, ið fyri nøkrum fáum umførum síðani vildi verið avgjørdur toppdystur, men tó framvegis er millum tvey av fremru liðunum, er tann við Margáir millum EB/Streym og KÍ, sum bæði vilja reisa seg aftur, eftir at tey taptu um vikuskiftið. Serliga mundi tað kennast sum smeitur fyri EB/Streym at tapa fyri HB, ið einki hevði víst áðrenn, meðan KÍ sum uppflytari má rokna við, at okkurt bakkast kemur her og harð. Í kvøld man EB/Streymur tó vera greiður favorittur.




*Tvey av liðunum, ið ætla sær at røkka langt í ár, HB og Víkingur, spæla í Gundadali í kvøld, so her liggur eitt ávíst trýst á báðum pørtum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Uppgerðin um botnin

Tað er nú ikki altíð, at teir mest áhugaverdu dystirnir eru millum fremstu liðini, og í kvøld munnu tað vera mong, ið eru spent eftir at vita, hvat av botnliðunum, 07 Vestur ella B71, fer at standa seg betur, tí tey bæði hittast í Sørvági. 07 Vestur fekk eina ovurstóra flongju í Runavík sunnudagin, samstundis sum B71 tók alt á bóli við sigri á ÍF í Fuglafirði. Nú ræður so um hjá 07 Vestur á heimavølli at vísa seg frá einari betri síðu, men hinvegin skal B71 eisini royna at prógva, at liðið megnar at vinna aftur.

Fimti dysturin verður ikki fyrr enn í annaðkvøld, tá NSÍ tekur ímóti ÍF, men hann er ikki minni áhugaverdur fyri tað. NSÍ hevur fingið eina góða byrjan í landskappingini og er næstfremst, bara eitt stig aftan fyri B36, meðan ÍF liggur seks stig longur niðri á stigatalvuni og svongist. NSÍ vant sunnudagin burtur úr 07 Vestur og ÍF mátti lúta fyri B71, so ikki kann sigast annað, enn at fortreytirnar hjá hesum báðum eysturoyarliðunum eru sera ymiskar, nú tey hittast.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Olga Kristina til Íslands

**FÓTBÓLTUR** 21 ára gamla argjakvinnan, Olga Kristina Hansen, er farin til Íslands at spæla við Álftanesi, sum er í A-bólkinum í næstbestu íslendsku kvinnudeildini

Hilmar Jan Hansen

Bæði sum A-landsliðsspælari og ikki minst sum AB-spælari, plagar Olga Kristina at gera vart við seg. Nú seks umfør eru farin av landskappingini, hevur hon longu skotið trý mál fyri AB, sum er á odda saman við KÍ – og triðja árið á rað skal royna at taka kappingina upp við klaksvíkskvinnur.

Men tað verður altso uttan 21 ára gomlu Olgu Kristinu, at AB skal royna at klára seg, tí mánadagin fór hon til Íslands, har hon í summar skal spæla við Álftanesi, sum er í A-bólkinum í næstbestu íslendsku kvinnudeildini.

Í mars mánaði var Olga Kristina til royndarvenjing hjá íslendska felagnum, ið hevur heimstað stutt uttan fyri Reykjavík, og tá gekst so mikið væl, at Álftanes vildi hava hana at koma aftur. Á páskum var hon so á venjingarlegu saman við liðnum, og nú eru hon so farin yvir til Íslands fyri at spæla við liðnum í summar.

Við heimasíðuna hjá FaroeSoccer hevur Olga Kristina Hansen sagt í vikuni, at næstbesta deildin í Íslandi er á sama stigi sum tey bestu liðini í føroysku kappingini.